




Puntur nr. 3



*Vatnið í baðilandinum er 28 hitastig, og luftin er 30 stig. Tað er tí talan um rættiligt tropiskt hitalag í tí risastóra baðilandinum í Lalandia*

# Feriuparadís í Lalandia

**Lalandia er størsti frítíðardepilin í Danmark, og vælumtókta feriustaðið bjóðar alt frá baðilandi, ítrótti og matstøðum til undirhald, spælipláss og handlar. Tíðin rýkur avstað í tí familjuvinarliga feriustaðnum har suðuri í Danmark**

Túsundatals fólk vitja á hvørjum ári feriustaðið Lalandia, sum liggur við Rødby har suðuri í Danmark. Lalandia bjóðar eina ørgrynnu av ymsum aktivitetum, og hugnaliga og innbjóðandi umhvørvi hevur gjørt Lalandia til eitt tað best umtókta feriustaðið av sínum slagi í Norðurlondum.

Tað var í 1980'unum, at arbeiðstakarin Ejnar Jensen fekk hugskotið at byggja Lalandia, og eftir miðvíst arbeiði í fleiri ár, lat Lalandia upp í desember mánaði 1988.

Síðani er nógv hent í Lalandia. Útbyggingar hava verið fleiri ferðir, og ikki minst seinastu árini er nógv gjørt fyri at betra og menna feriustaðið.

Nú liggja 25.000 fermetrar av Lalandia undir taki, og tað er næstan óhoyrt í einum slíkum feriustaði. Matstøð, handlar, gongugøtur, ítróttarfasilitetir, aktivitetir til børnini og mangt annað er innandura, og eingin klárar at keða seg í Lalandia. Har er nakað at gera fyri øll, um umstøðurnar eru sum heild av teimum allarbestu.

## Baðilandið dregur

Eitt tað besta agnið hjá Lalandia er tað ovurhonds stora baðilandið, sum er eitt slag miðdepli í feriustaðnum. Baðilandið er 7.400 fermetrar til støddar, og har eru alskyns svimjihyljar, spa-baðikør, sauna, skeiðibreytir og annað at royna.

Baðilandið í Lalandia verður roknað sum besta baðilandið í Danmark, og tað er ikki av ongum. Nógv er gjørt við fasilitetirnar, og har er rúmligt, hóast tað kunnu verða upp í 1500 fólk inni samstundis.

Vatnið í baðilandinum er 28 hitastig, og luftin er 30 stig. Her er tí talan um rættiligt tropiskt hitalag.

Tað eru ikki minst tær fýra skreiðibreytirnar í baðilandinum, sum veruliga lokka fólk til baðilandið. Skreiðibreytirnar eru upp í hundrað metrar til longdar, og tað er framúr stuttligt upplivilsi at lata seg skreiða avstað við nógvari ferð og enda úti í einum hylja eina góða løtu seinni.

Fyri tey, sum búgva á Lalandia, er baðilandið ókeypis at brúka, og eingin keðir seg í baðilandinum, hóast tað verður vitjað í nakrar tímar um dagin.




